Átøk at fremja lesihugin – Føroyar lesa

Upprit

Inngangur

Nógv hevur verið at hoyrt í almenna rúminum um lesivanar hjá børnum og ungum, men okkum hevur tørvað dagførda og nágreiniliga vitan um lesivanar í skúlahøpi og uttan fyri skúlan; eina vitan, sum í tølum kann vísa okkum, hvussu støðan er her og nú. PISA-kanningarnar hava víst, at ein ov stórur partur av okkara børnum dugir ov illa at lesa, hóast lesing er eitt amboð og vegurin inn í flestu lærugreinar í skúlanum, sum tað verður sagt í námsætlanunum:

"Næmingurin skal haldast til at lesa nógv, bæði í skúlanum og framíhjá" (*sí skjal 1 á s. 9*)

Endamálið við kanningini um lesivanar var at fáa nýggja, dagførda vitan um lesing, hugburð til lesing og tilfar, og at fáa at vita, um okkara børn og ung lesa í nóg stóran mun, so gróðrarbotnur er fyri, at teirra mál og lesiførleiki mennist. Spurningarnir, sum vórðu settir, eru sprotnir úr vitan um, hvat hevur týdning fyri lesing, eisini soleiðis at svarini kunnu geva ábendingar um, hvørji tiltøk kunnu verða sett í verk. Harumframt hava vit hugt at kanningum, ið eru gjørdar í grannalondunum og t.d. Onglandi, umframt at vit hava lagað spurningarnar til, soleiðis at okkara úrslit kunnu samanberast við nýggja kanning, ið er gjørd um somu tíð um somu viðurskifti í Danmark.

Kanningin av lesivanunum er eitt amboð í menningini av lesiførleikanum og lesihuginum hjá børnum, sum er ein hornasteinur í læring, mentan og menning. Úrslitini eru áhugaverd fyri foreldur, skúlar, skúlaleiðslur, lærarar, skúlastýri, myndugleikar, politikarar, útbúgvingarstovnar, bókasøvn og forløg – og tey rópa eftir, at vit seta átøk í verk, sum styrkja lesihugin hjá okkara børnum. Hetta uppritið til tilmæli um átøk er ein liður í at varpa ljós á, hvørji átøk eiga at verða sett í verk.

Hví kanna lesivanarnar?

Lesing og lesiførleiki eru ein grundleggjandi førleiki, tá ið tú skalt nema tær lærdóm og vitan. Lesing er grundarlagið, sama um tú velur at fara í miðnám ella ikki, sama um tú velur eina bókliga útbúgving ella ikki, tí lesing er ein av fortreytunum fyri at vera virkin í samfelagnum.

Harumframt er lesing vegurin inn í bæði yrkisbókmentir og fagurbókmentir, sum geva okkum eina rúgvu av vitan og upplivingum sum menniskju. Lesing er, fyri tey sum eru lesarar, ein ótømandi kelda til gleði, spenning og undirhald. Gjøgnum bøkur kann barnið lesa um ymiskar kenslur og tankar, fólk hava, og um støður, sum ymisk fólk koma í. Hetta er gevandi og læruríkt, og tað ger, at barnið lættligari kann kenna seg sjálvt aftur og læra onnur at kenna. Barnið víðkar sjónarringin, fær

vitan um verðina og lærir nýggj hugtøk, ið er neyðug undanvitan fyri lesifatan, og lærir at hugsavna seg.

Gerandisdagurin hjá børnum er nógv broyttur seinastu árini, og talgilda verðin bjóðar børnum undirhald og upplivingar upp í rúgvur. Tað er tó soleiðis, at skal barnið gerast ein góður lesari, er venjing neyðug – tað at lesa nógv og ymiskt tilfar á tí støði, har barnið er. Tað er ikki vist, at hóast barnið dugir at lesa, tað vil siga dugir teknisku lesiførleikarnar, at tað gerst *lesari*.

Lesing og málførleiki

Børn læra sítt ella síni móðurmál gjøgnum samskifti við onnur longu frá móðurlívi. Samskiftið, ið barnið hevur frá tað er føtt, er bæði nonverbalt og verbalt, og tað hevur stóran týdning, at barnið er í sosialum sambondum og verður stimbrað málsliga. Barnið mennist við at hoyra mál, bæði talu í samskiftinum við onnur og gjøgnum upplestur. Lesing, bæði upplestur og tá ið barnið sjálvt seinni dugir at lesa, hevur týdning, tí menningin av málførleikanum m.a. er kjølfestur í skriftmálinum. Ígjøgnum lesing koma børn og ung í samband við skriftmálið. Skriftmál er meira komplekst enn talumál og hevur ríkari orðfeingi; tá ið børn lesa ella hoyra skrivaðan tekst, kann hetta lyfta teirra egna málførleika á hægri støði – bæði í talu og skrift. Málførleikin hevur týdning fyri, hvussu tað einstaka barnið klárar seg víðari í lívinum og hevur sostatt alstóran týdning fyri samfelagið, tí málførleikin er ein av hornasteinunum í sosialum sambondum, útbúgving og luttøku í samfelagnum. Tað ber tískil til at bøta um málførleikan ígjøgnum lesing og eisini at betra lesiførleikarnar við at lesa nógv, og tí er tað týdningarmikið at fáa ítøkiliga vitan um lesivanar til vega, tað vil siga vitan um hvat, hvar og hvussu nógv børn lesa.

Hvat krevst fyri at hava góðan málførleika, og hvat forðar tí? Hevur tú ongantíð skrivaðan tekst fyri tær, mennir tú ikki málið á fullgóðan hátt; tað er ikki nóg mikið bara at hoyra onnur børn ella vaksin tosa, tú mást eisini lesa fyri at ogna tær góðan, ríkan og djúpan málførleika, t.d. orðfeingi. Orðfeingi eru orð, sum liggja í huganum, og sum verða tikin fram í minninum. Fyri at menna orðfeingið krevst, at børn hoyra og síggja orð aftur og aftur, og at torleikastigið í tekstunum, tey lesa, alla tíðina hækkar samsvarandi aldursstiginum og førleikastiginum hjá barninum. Barnið, sum lesur, hevur betri orðfeingi og lættari við at skilja tekst og orða seg, bæði í talu og á skrift.

Ein avleiðing av, at børn lesa lítið og einki, kann vera, at tey ongantíð koma á lagið at lesa flótandi og raðið, at tey rætt og slætt gerast vánaligir lesarar, og at tey lesa seint; lesur tú seint, ávirkar tað eisini hugin hjá tær at lesa. Í øllum lærugreinum er nógv at lesa. Eldri børnini gerast, truplari verður teksturin. Bæði setningsbygnaður, innihald og orð verða torførari, og meiri abstrakt orð koma fyri í

øllum lærugreinum; lesur tú ikki, hevur tú ilt við at lesa truplari tekst, skilja orðini og kenna tey aftur. Skriftmálið er so samansett, at venjast børn ikki við skriftmálið, meðan tey eru smá, so menna tey ikki orðfeingið, og tey megna ikki at lesa abstraktan tekst. Hesi børnini, sum ikki lesa, renna seg í nógvar forðingar, og tey dragna afturúr samanborið við tey, sum lesa.

Mangan verður Matteus-effektin tikin fram í málmenningarhøpi, og tað er ikki uttan orsøk; hon sipar til evangeliið eftir Matteus, kap. 25, ørindi 29, sum sigur: "Tí hvør tann, ið hevur, honum skal verða givið, og hann skal hava yvirflóð; men tann, ið ikki hevur, frá honum skal verða tikið eisini tað, ið hann hevur." Júst soleiðis er við lesingini: tey, sum duga og lesa, fara at duga betur og læra meiri, og øvut, tey, sum ikki duga, læra ikki meiri. Hesi eru eisini í vanda fyri at steðga upp, geva skarvin yvir og koma ongantíð í gongd samanborið við lesaran, sum er í støðugari menning. Eisini er tað ávíst, at orðfeingið hjá børnum heilt niður í hálvtannað ár kann fyriboða lesimenningina hjá børnum nógv ár seinni. Tað vil siga, at kennir barnið nógv orð, tá ið tað er lítið, so verður lesitilgongdin helst lættari; hinvegin kennir barnið fá orð, tá ið tað er lítið, eru størri sannlíkindi fyri at enda undir miðal í lesiførleika seinni í skúlatíðini.

Tilvit og vitan

Tilvitið og hugburðurin um týdningin, lærarin og námsfrøðingurin hava á menningina hjá næmingum, hava ógvuliga nógv at siga. Samanhangurin millum at lesa og at duga at málbera seg neyvt og gjølla og skriva abstraktan tekst má vera týðiligur í læraraútbúgvingini og eftirútbúgvingarhøpi. Tað hevur ógvuliga stóran týdning, at skúlin allan vegin í skúlaskipanini ger næmingarnar varugar við týdningin, sum lesing hevur fyri orðfeingi, málførleika og skriviførleika. Tað er í bókum, tú finnur eitt kompleksari mál á skrift, tí í bókum er málið umhugsað. Fyri at kunna vísa næminginum á henda týdningin, er tað ein fortreyt, at lærarin onkursvegna vísir vegin og er ein fyrimynd. At hann veit um bøkur og tilfar, sum kunnu fanga næmingin, og at hann megnar at finna eina bók til næmingin, sum hóskar til hansara. Tað treytar sjálvandi, at lærarin veit hvørjar bøkur koma út, kunnar seg um tær og stuðlar næmingunum í lesingini í breiðastu merking. Tað snýr seg um at geva barninum framtíðarmøguleikar, og at lærarar eru kveikjarar og berarar av mentan og vitan og tilvitaðir um tann stóra týdning, teir hava. Men menningin byrjar langt áðrenn barnið fer í skúla, og tí er tað eisini av stórum týdningi, at tilvit og vitan um máltøku og málsliga menning er týðandi partur í bæði námsfrøðiligu útbúgvingini og eftirútbúgving.

Høvuðsspurningar úr kanningini

Nakrir av høvuðspurningunum, vit settu okkum fyri at fáa svaraðar, vóru hesir:

- Hvussu ofta og hvussu nógv lesa børn?
- Hvat lesa tey?
- Á hvørjum máli lesa tey?
- Á hvørjum miðli lesa tey?

Háttalagið var ein kvantitativ spurnakanning, har næmingarnir skuldu krossa av á einum pappírsspurnablaði, sí frágreiðing um kanningina á www.malmenning.fo.

Høvuðsúrslit úr kanningini

- Tveir triðingar av børnunum ella 65,6 % av øllum børnunum í øllum trimum árgangunum í 4., 6. og 9. flokki lesa sjáldan ella ongantíð í frítíðini.
- Samanbering millum tey, sum siga seg lesa hvønn dag, og tey, sum ikki lesa, vísir týðiliga, at tey, sum ikki lesa, nýta talgildu miðlarnar nógv meiri enn tey, sum lesa.
- 28 % brúka ofta ella sera ofta ensk orð, tá ið tey mangla ella ikki kenna føroyska orðið. Um hugt verður at ensku málnýtsluni og lesing, sæst, at tey børnini, sum lesa nógv, ikki brúka ensku orðini líka nógv, sum tey, sum ikki lesa. Av teimum, sum lesa nógv, siga 19 % seg brúka ensk orð, tá ið tey ikki kenna føroyska orðið, meðan talið hjá teimum, sum ikki lesa er 32 %.
- Stórur munur er á, hvussu nógv børnini læna bøkur á bókasavninum alt eftir hvørjum flokki tey ganga í. Tá ið hugt verður at flokkunum, sæst, at tey í 4. og 6. flokki læna nokkso nógv, meðan tey í 9. flokki læna nógv minni. Í teimum báðum yngru flokkunum liggur talið um 50 %, meðan tað í 9. er bara 9 %. Um bókasavnsvitjanirnar verða samanbornar við, hvussu ofta tey lesa, sæst – og tað er eisini væntandi – at tey, sum lesa nógv, eru títtari gestir á bókasøvnunum, munurin er 55 % og 25 %.
- Næmingar siga, at tey høvdu lisið meiri, um bøkur vóru um evni, sum hava teirra áhuga (her var møguleiki at seta fleiri krossar). 60% hava sett kross við henda møguleikan. 47% siga, at um tey vistu onkra góða bók, so høvdu tey lisið meiri. 13 % høvdu lisið meiri, um tey dugdu betur at lesa.

- Tá ið borið verður saman við Danmark, sæst, at føroyskir næmingar lesa munandi minni enn teir donsku næmingarnir, í summum førum ikki meiri enn eina góða helvt av tí, sum tey lesa í Danmark.
- Tá ið spurningurin um hugburð til lesing verður settur saman við flokki, kyni og hvussu ofta tey lesa, sæst millum annað, at gentur hava ein meiri jaligan hugburð til lesing, og at tær eisini oftari halda seg fáa nakað burtur úr lesingini.
- Dreingir lesa minni enn gentur á føroyskum, men lesa meiri á enskum enn genturnar, sama er við øðrum málum. Genturnar lesa meiri á donskum enn dreingirnir. Tá ið ræður um flokkarnar, sæst, at tey í 9. flokki lesa nógv meiri á enskum enn hinir árgangirnir. Tað at lesa á føroyskum minkar, jú eldri næmingarnir gerast. Tey, sum siga seg lesa nógv í frítíðini, lesa eisini meiri á føroyskum, men tey, sum siga seg lesa lítið ella einki, lesa eitt sindur oftari á enskum enn tey, sum lesa nógv; tølini eru 57 % fyri tey, sum ikki lesa, og 50 % fyri tey, sum lesa.
- Tá ið tølini verða samanborin fyri tey, sum siga seg lesa nógv í frítiðini, og tey, sum ikki lesa, sæst, at hjá teimum, sum lesa nógv í frítiðini, so lesa foreldrini eisini, 76 % svara, at foreldrini lesa heima. Hjá teimum, sum ikki lesa, er hetta talið 57 %.
- Tá ið vit hyggja at flokkum, so er kyn ein variabul, sum ávirkar, um flokkurin endar í topp 10 ella botn 10. Í mun til mál, so er tað eisini soleiðis, at har, sum tað eru flest, sum tosa føroyskt í flokkinum, so er flokkurin millum topp 10. Millum topp 10 flokkarnar eru tað 21 % av børnunum, sum læna bøkur á bókasavninum heim við næstan hvønn dag ella fleiri ferðir um vikuna í mun til 5 % í botn 10.

Hjáveiða

Onnur áhugaverd úrslit eru eisini enn tey, sum verða tikin fram í frágreiðingini, og nógv jaligt er at finna millum úrslitini. 9 út av 10 siga seg vera saman við vinum hvønn dag ella fleiri ferðir um vikuna, knapt 80 % íðka ítrótt hvønn dag ella nakrar ferðir um vikuna, 80 til 85 % siga, at tey læra nakað, at tey trívast væl og hava vinir í skúlanum, og 89 %, at tey altíð ella næstan altíð gera skúlating.

- Um hugt verður at gentum og dreingjum, so eru nógv fleiri gentur, 75 %, enn dreingir, 55 %, sum siga seg dáma væl at ganga í skúla. Eisini sæst, at 92 % av gentunum halda, at læararnir eru fittir móti sær, meðan talið hjá dreingjunum er bara 78 %. Tað sæst týðiliga, at

tey, sum siga seg hava góðan hug at ganga í skúla, eisini eru tey, sum lesa mest í frítíðini, tølini eru ávikavist 74 % og 59 %.

- Hyggja vit at kynunum, sæst, at færri dreingir enn gentur fáa hjálp til skúlating.
- Her sæst, at tað, sum vit hugsa sum vanligu miðlarnar, stendur veikt; nógv siga seg ongantíð hvørki hyggja í sjónvarp ella lesa bløð og bøkur.
- Her er eingin ivi, børnunum dámar nógv best at lesa á pappíri, tað svara 64 %, og 14 % svara telefonin sum besti miðilin.
- Tey, sum eiga nógvar bøkur heima, lesa oftari fleiri ferðir um vikuna, enn tey, sum eiga fáar bøkur.
- Um hugt verður at kyninum í mun til, hvussu tey finna bøkur, sæst lítil munur. Størsti munurin er, at gentur í nógv størri mun fáa íblástur frá vinfólkum. Í 4. og 6. flokki finna tey oftari bøkurnar sjálv, men at eisini lærararnir og foreldrini eiga størri leiklut í 4. og 6. flokki heldur enn í 9. flokki. Í 9. flokki brúka tey eisini munandi meiri netið at leita sær eftir bókum enn hinir árgangirnir.
- Um hugt verður at svarunum, hvat kundi gjørt, at børnini lósu meira í mun til tey, sum siga seg lesa ella ikki lesa, sæst, at tey, sum lesa nógv, høvdu lisið meira, um tað vóru fleiri bøkur á føroyskum, og um tey høvdu betri tíð. Hinvegin høvdu tey, sum ikki siga seg lesa (48 %), lisið meira um tey vistu um góðar bøkur, og 16 % av teimum, sum ikki siga seg lesa, høvdu lisið meira, um tey dugdu betur at lesa.
- Dreingir halda seg duga betur at rokna enn gentur halda seg duga at rokna, og við lesingini er tað øvut, at fleiri gentur halda seg duga at væl at lesa, enn dreingir halda seg duga at lesa. Men munurin er lítil. Fleiri dreingir halda, at lesing er torførari lærugrein enn aðrar.
- Tá ið hugt verður at hesum tølunum og hvørjum flokkum tey ganga í, sæst, at tey í teimum yngru flokkunum oftari hava lesiløtu, í 4. flokki eru tey 81 %, meðan tey í 9. flokki bara eru 22 %. Hinvegin tosa tey í teimum eldru flokkunum meiri um tað, sum tey lesa, 77 % í 9. flokki, meðan tað bara eru 42 % í 4. flokki.
- Um hugt verður at frítíðarítrivunum og huginum at lesa, so sæst, at tey, sum ganga til tónleik, og tey, sum ganga til onnur ítriv, siga seg lesa munandi meiri enn tey, sum ikki ganga til hesi ítriv. Hinvegin sæst, at tað at ganga til ítrótt onga ávirkan hevur á lesihugin.
- Um tølini verða samanborin fyri tey, sum siga seg lesa nógv, og tey, sum einki lesa, sæst, at tey, sum lesa nógv, eisini nógv oftari siga seg duga væl at lesa og rokna. Tá ið svarini verða

samanborin við tey, sum lesa nógv, og við tey, sum ikki lesa, so sæst, at tey, sum siga seg lesa nógv, eisini í størri mun halda seg duga betur at lesa enn hini í flokkinum.

Tilráðing um átøk

Aðalendamálið við átøkunum er at skapa eina betri lesimentan í føroyska samfelagum sum heild. Kanningin av lesivanunum, ið var løgd fram á vári 2018, vísti ikki bara, at ov lítið verður lisið av hugi ímillum næmingar, men eisini, at stórur munur er á lesihuginum í ymsu flokkunum, og at lesingin tykist at vera vorðin ein skylda, ið verður tengd at skúlanum og ikki longur er nakað sjálvsagt, ið næmingar stytta sær stundir við. Neyðugt er, at vanar verða broyttir, og at hugburðurin til lesingina verður tengdur at hugi, gleði, innliti og vitan, at lesiførleikarnir verða styrktir, at vitanarstøðið verður hækkað, at serligur dentur verður lagdur á at fáa eldru næmingar at lesa av hugi, og at lesitilfar er atkomiligt í øllum økjum í landinum.

Kunning og miðling eru lyklaorð í hesum høpinum saman við einum breiðum og stórum úrvali av lesitilfari, soleiðis at einhvør næmingur fær møguleika at finna júst ta "røttu" bókina, ið mennir hennara/hansara lesihug og lesigleði.

Ítøkilig uppskot til átøk

1. **Kvalitativ kanning**. Mælt verður til, at ein dýpandi kvalitativ kanning við støði í lesikanningini 2018 verður gjørd, har ið kannað verður nærri, hvat býr undir ávísum úrslitum í lesikanningini. Í kvalitativu kanningini verður farið aftur um lesingina í skúlanum, lesivanarnar uttan fyri skúlan, lesihugburðin, miðlavanarnar, hvussu lærarar arbeiða við lesingini í skúladegnum, hvussu arbeitt verður við orðfeingi innan skúlagátt, og hvussu atkomiligar bøkur eru á skúlum. Spurningarnir í kvalitativu kanningini verða settir við støði í spurningunum í lesikanningini. Kvalitativa kanningin eigur eisini at fevna um, hvussu tímarnir í føroyskum í grunddeild og miðdeild verða gagnnýttir. Mælt verður til, at sami bólkur, ið varðar av lesikanningini, eisini varðar av kvalitativu kanningini. *Sí skjal 2 á s. 10, sum vísir, hvat vit kunnu læra av donsku kvalitativu kanningini.*

2. **Eftirútbúgving.** Mælt verður til, at námsfrøðingar og lærarar verða eftirútbúnir (skeið) við tí í hyggju at nema sær vitan um týdningin, ið lesingin hevur fyri málsligu menningina hjá

barninum, hvat býr í hugtakinum "lesihegni", og hvønn týdning orðfeingi hevur fyri lesiførleika. Somuleiðis skal skeiðið vísa á gongdar arbeiðshættir í praksis at menna nevndu førleikar. Kanningin av lesivanunum vísir, at lærarin saman við foreldrunum hevur stóran týdning, tá ið talan er um at vísa á, hvar børn og ung kunnu finna bøkur at lesa; fleiri vísa á læraran enn á foreldrini; 37 % siga seg lesa, tí lærarin sigur, at tey skulu, meðan 17 % siga, at tey lesa, tí foreldrini siga, at tey skulu. Tey flestu finna tó bøkurnar sjálv uttan hjálp. Lærarin hevur stóra ávirkan á tey fáu, sum siga seg lesa í 9. flokki, tí tey siga, at grundin til, at tey lesa, er, at lærarin sigur, at tey skulu. Sostatt váttar henda nýggja kanningin tað, ið aðrar kanningar siga, nevniliga, at lærarin hevur sera stóran týdning fyri næmingin, bæði tá ið talan er um hugburð, eldhuga og annað. Meðan leikluturin hjá foreldrunum minkar eftir 4. og 6. flokk, tá ið talan er um at halda barnið til bókina, so heldur lærarin fram at hava stóran týdning; hann hevur størri týdning, eldri næmingarnir verða. Serliga fyri dreingirnar hevur lærarin týdning, tí fleiri teirra vísa á, at teir lesa, tí lærarin sigur tað.

Lærarin kann lesa burtur úr hesi kanningini av lesivanunum hjá føroyskum børnum í dagsins samfelag, at tað er ikki til fánýtis at varpa ljós á týdningin at lesa, tí børnini vísa á, at tað er lærarin saman við foreldrunum, sum er orsøkin til, at tey lesa, lærarin meiri enn foreldrini. Lærarin má gera sær greitt, at hann hevur møguleika at venda gongdini hjá nógvum børnum. Hann hevur saman við foreldrunum sera stóra ávirkan á, um næmingurin mennir seg í lesing og fær góðar málførleikar.

3. **Tilfar.** Mælt verður til, at bókaútgávan verður økt munandi, soleiðis at einhvør lesari fær møguleikar at finna "røttu" bókina. Í øllum kanningum – bæði her á landi og uttanlands – og í øllum samrøðum við børn verður víst á, hvussu stóran týdning "rætta" bókin hevur fyri bæði lesihug og lesigleði. Í lesikanningini 2018 og í samrøðum við børn í ÚF í heyst sást og hoyrdist, at børnini ikki meta seg at hava nóg stórt og breitt úrval av bókum at velja í. *Dømi úr lesivanakanningini vísa hetta:* Næmingar siga, at tey høvdu lisið meiri um bøkur vóru um evni, sum hava teirra áhuga (her var møguleiki at seta fleiri krossar). 60% hava sett kross við henda møguleikan. 47% siga, at um tey vistu onkra góða bók, so høvdu tey lisið meiri. Gentum samanborið við dreingjum dámar sum heild betur tey ymsu tekstasløgini; serliga er hetta bøkur um kærleika (38 % móti 7 %) og bøkur um vinalag (37 % móti 12 %). Gentum dámar eisini betur fantasybøkur, spenningsbøkur og krimibøkur. Dreingjum dámar betur faktabøkur (23 % hjá dreingjum og 16 % hjá gentum), og so hava teir munin við einum prosentstigi, tá ið

umræður teknirøðir (19 og 18 %). Ein spurningur er: *Hvørjar bøkur dámar tær at lesa?* Her kunnu fleiri krossar setast. Best umtóktu bøkurnar eru spenningssøgur, 52 %, bøkur um søgur frá veruleikanum, 45%, og stuttligar bøkur, 44%. Teimum í 9. flokki dámar best bøkur um kærleika og søgur frá veruleikanum, meðan tey í 4. flokki serliga nevna stuttligar bøkur og ævintýr umframt myndabøkur og so serliga krabbabøkur, sum tey lesa nógv oftari enn hinir árgangirnir.

4. **Skúlabókasøvn.** Somuleiðis verður mælt til, at skúlabókasøvnini verða uppraðfest og eru á øllum skúlum, so bøkur eru atkomiligar fyri øll børn. Útbúgvin starvsfólk skulu verða tøk á skúlunum at hjálpa barninum at finna "røttu" bókina. *Dømi úr lesivanakanningini vísa hetta:* Hvussu ofta lænir tú bøkur á bókasavninum? (í skúlanum) Her sæst, at 65 % av næmingunum siga seg ongantíð ella næstan ongantíð læna bøkur á skúlabókasavninum. Bara 14 % siga seg læna fleiri ferðir um vikuna. Hvussu ofta lænir tú bøkur á bókasavninum heim við at lesa? Her sæst, at 80 % av næmingunum ongantíð ella sjáldan læna bøkur á bókasavninum heim við at lesa; 20 % gera hetta fleiri ferðir um mánaðin ella oftari. Eisini sæst, at tey í 9. flokki læna munandi minni, 6 % í mun til 35 % í fjórða flokki. Hvør hjálpir tær at finna tær bøkur tú lesur í frítíðini: Her kunnu fleiri krossar setast. Nógv tey flestu finna bøkurnar sjálv; 60 % hava sett kross við tann møguleikan. Síðan eru tað lærarar (16 %), foreldur (19 %), vinir (15 %) og bókavørðir (9 %), sum eru tey, sum hjálpa næmingunum at finna bøkur. 32 % svara, at tey ongantíð ella næstan ongantíð lesa bøkur í frítíðini. Foreldur, vinir og lærarin hjálpa sostatt á leið líka ofta barninum at finna bøkur at lesa í frítíðini.

5. **Skipað lesing í skúlanum**. Kanningin av lesivanunum vísir, at tað er ógvuliga ymiskt, hvussu høgt skúlar raðfesta lesiløtur, lesivikur og tiltøk, sum hava til endamáls at fáa børn at lesa meiri. Henda vitanin, og tann sannroyndin, at tað verður lisið alt ov lítið í frítíðini, sigur okkum, at tað er ógvuliga misjavnt, hvussu nógva venjing í lesing, næmingarnir fáa í dag. Hóast átøk eiga at verða sett í verk, soleiðis at børn og ung lesa meiri í frítíðini, eigur reglulig lesing at verða sett á skrá alt árið fyri hvørt floksstig í øllum skúlum, soleiðis at allir skúlar hava eina ítøkiliga ætlan, tá ið talan er um lesing. Reglulig lesing merkir, at lesing er fastur táttur á tímatalvuni fleiri ferðir um vikuna alt skúlaárið, og tað er bæði frílesing, og at lærarin lesur fyri næmingunum. Í hesum punktinum savna vit okkum um lesing, sum næmingurin sjálvur velur av áhuga; lesing av áhuga hevur sera stóran týdning, men tað er ein veruleiki, at nógvir næmingar ikki sjálvir megna at

finna tað, sum hevur teirra áhuga at lesa. Úrslit í lesivanakanningini vísa, at næmingunum tørvar hjálp at finna røttu bókina, tí mugu lærarar og bókavørðir hjálpa teimum. Granskarar vísa á, at tað er ikki avgerandi, hvussu leingi tey lesa hvørja ferð, men hvussu regluliga tey lesa.

6. **Føroyar lesa 2020**. Mælt verður til, at arbeiðsbólkur verður settur at fyrireika málrættað og landsumfatandi lesiátak í 2020, ið tekur støði í úrslitunum, sum koma fram í kvalitativu kanningini, vit mæla til verður gjørd, og at varpa ljós á bókina sum týðandi mentanaramboð og vitanarbera. Arbeiðsbólkurin skal savna allar partar, ið varða av bókaútgávu, bókasølu, miðling av bókum, játtandi myndugleikar, ymsar stovnar, eins og onnur, ið kunnu hugsast at kunna virka við til at menna áhugan og vitanina um lesing. Aðalendamálið við landsumfatandi lesiátakinum er at skapa eina betri lesimentan í føroyska samfelagum sum heild.

7. **Kunning og miðling**. Mælt verður til, at ljós verður varpað á lesigleði í **almenna rúminum**, og at hetta verður partur av uppgávuni hjá arbeiðsbólkinum, sum verður settur at fyrireika átakið *Føroyar lesa 2020.* Miðlingin og kunningin skal gera bøkur og annað lesitilfar, eins og týdningin, ið lesingin hevur, sjónligt í gerandisdegnum. Miðlingin kann samskipast umvegis bókasøvn, bókasølur, forløg, KvF, privatar miðlar, almenn lesitiltøk, lýsingarátøk í almenna rúminum o.a.

8. **Kunning og miðling til børn**. Somuleiðis verður mælt til, at alt tilfar, ið hevur áhuga hjá yngri og eldri børnum, verður savnað á einum barnaportali. Portalurin skal hýsa og miðsavna tilfar, ið børn í ymsum aldrum hava áhuga fyri, so tað er lætt atkomuligt hjá øllum. Fleiri heimasíður eru til, til dømis Píka7 og Strok, sum bæði eru bløð og heimasíður. Fæst størri fíggjarlig orka, kundi ein miðsavnandi portalur, ið børn og foreldur leita til eftir tilfari, verið mentur. Hetta hevur sera stóran týdning, tí vit vita, at børn niður í smábarnaaldur hyggja at tilfari á øðrum máli, á eitt nú Youtube.

9. **Øll børn somu møguleikar** Greiningin av flokkum og lesitíttleika/hugburði vísir, at stórur munur er á, hvør hugburður ger seg galdandi í flokkum til lesing. Greiðar ábendingar eru um, at vit eiga at gera kvalitativar kanningar fyri at kanna, hvat tað er, sum ger, at heilir flokkar av næmingum hava jaligan og neiligan hugburð til lesing; vit kunnu hóskandi spyrja, hvat verður

gjørt á staðnum at stimbra lesihugin, hvussu nógv verður gjørt við at vísa á týdningin av at lesa, og hvussu tað verður virðismett, at tað verður lisið. Tað er í grundini undranarvert, at so stórur munur er á hugburðinum, tá ið hugsað verður um, at flestu lærarar í Føroyum koma av sama lærustovni, at teir hava somu námsætlanir at halda seg til, sama undirvísingartilfar, somu karmar, og at samfelagið, hóast tað er í broyting, er rættiliga einsháttað, tá ið hugsað verður um fólkasamanseting. Orsøkin kann m.a. liggja í floksdynamikkinum, sum ger, at næmingar í einum flokki fáa líknandi atburð og vanar, og at tað er ymisk mentan, ið ger seg galdandi í flokkum, skúlum ella á ávísum støðum. Vit koma ikki uttanum, at kósin í teimum flokkum, har tað er ráðandi, at tað ikki hevur so stóran týdning at duga at lesa, er ikki góð, tí hetta eru heilir flokkar talan er um; børnini, ið vaksa upp í slíkum umhvørvi, hava verri fortreytir enn javnaldrarnir aðrastaðni at klára seg væl seinni í skúlaskipanini og í lívinum.

10. **Lesikanning 2021-22**. Mælt verður til, at lesikanning verður gjørd í 2021-22 eftir sama leisti sum lesikanningin 2018. Tá ber til at sammeta báðar kanningarnar. Lesikanningin 2021-22 kann somuleiðis vísa, um átøkini og landsumfatandi lesiátakið hava gjørt mun. Soleiðis kann hon brúkast sum bæði eftirmeting og staðfesting av støðuni. Mælt verður til, at sami bólkur, ið varðaði av lesikanningini 2018, eisini varðar av hesi komandi lesikanningini.

11. **Orka verður sett av til at talgilda tilfar til pallar, sum børn brúka í dag.** Ein sannroynd er, at enskt trokar seg inn á føroyskt. Átak fyri at ávirkanin verður tálmað ella minkað ella at øll børn fáa eitt veruligt føroyskt talgilt tilboð. Føroysk tala og tónleikur eigur at verða lagt á tilfar, sum føroysk børn brúka serliga nógv, t.d. filmar frá Disney og Pixar. Hetta, so at børn hoyra føroyskt mál sum fyrimynd.

12. **Heiðra barnabókina.** Í øðrum londum hava tey ein ávísan dag á hvørjum ári, har ljós verður varpað á barnabókina og týdningin av lesing. Eitt átak í Føroyum kundi verið, at almennu Føroyar eina ferð um árið seta sjóneykuna á dygdargóðu barnabókina, góða lesitilfarið og tiltøk, sum fremja lesigleði. Tey, sum onkursvegna skara framúr í so máta, eiga at verða heiðrað.

Skjal 1

Námsætlanirnar hjá MMR siga eisini hetta um lesing:

> *"Næmingurin skal haldast til at lesa nógv, bæði í skúlanum og framíhjá. Umráðandi er, at lesingin verður løgd til rættis samsvarandi tí førleikastigi, næmingurin er á. Eitt gott lesiumhvørvi í skúlanum er ein treyt fyri at menna góðar og fjølbroyttar lesiførleikar. Hetta verður skapt í flokkinum við nógvum ymiskum lesitilfari og góðum vanum. Skúlabókasavnið er ein sjálvsagdur partur av hesum góðu vanum. Fyri at røkka góðum lesiumhvørvi er av stórum týdningi, at skúlabókasavnið er ein natúrligur partur av skúlagongdini."*

Skjal 2

Hvat kunnu vit læra av donsku kvalitativu kanningini

Um somu tíð, sum kanningin av lesivanunum hjá 4., 6. og 9. flokki var gjørd í Føroyum, var kanning gjørd av lesivanunum hjá børnum í 3.-7. flokki í Danmark; í kjalarvørrinum á teirri kanningini læt *Tænketanken Fremtidens Biblioteker* gera eina kvalitativa kanning, har farið er aftur um svarini hjá 28 næmingum í 6. flokki. Av tí at donsku úrslitini leggja seg upp at úrslitunum í føroysku kanningini, og mentanin millum børn í Føroyum og Danmark eins og samfelagið á mangan hátt líkist, eiga vit at hyggja nærri at niðurstøðunum í donsku kvalitativu kanningini, tí útsagnirnar hjá donsku børnunum geva okkum betri innlit í lesi-, miðla- og frítíðarvanarnar hjá teimum.

Eins og í Føroyum minkar lesingin í frítíðini í Danmark eisini í stóran mun, tá ið næmingar eru í miðdeildini í fólkaskúlanum. Ein reyður tráður í kvalitativu kanningini er, at tað er ein felags uppgáva at leiða børn inn í eina lesimentan og bókasavnsmentan.

- Eingin ger tað einsamallur. Tað er tørvur á, at bæði skúlar, námsfrøðiligir lærudeplar, foreldur og bókasøvn vegleiða og geva íblástur til lesing, umframt at hesi virka sum lesandi fyrimyndir og virkið ganga á odda fyri at lata upp fyri øllum teimum møguleikum, sum bókasøvn kunnu bjóða børnum.

Skulu børn haldast til bókina, er tað av stórum týdningi, at tey vaksnu rundan um barnið, ikki sleppa børnunum ov tíðliga.

- Hóast børn á mangan hátt eru sjálvbjargin og sjálv finna fram til tað, tey hava hug til, vísa kanningar, at børn í miðdeildini framhaldandi hava tørv á, at tey vaksnu vísa áhuga fyri tí, børnini lesa, og hvussu tey brúka miðlarnar.

Samstarvið millum skúla og bókasøvn er týðandi, tá ið vit umrøða, hvussu vit kunna eggja børnum at lesa meiri og oftari. Kanningarnar, sum eru gjørdar av lesivanunum í Føroyum og Danmark, vísa, at børn seta lesing í samband við tað, tey mugu gera, meiri enn tað, tey hava hug at gera. Lesihugur kemur tískil ikki av sær sjálvum. Skúlar og bókasøvn mugu leggja upp fyri hesi sannroynd í miðlingini. Umframt mugu fólkabókasøvnini endurhugsa, hvussu tey venda sær til brúkararnar.

- Tey, sum arbeiða á bókasøvnum, mugu vera meiri uppsøkjandi og hugsa floksstovurnar hjá næmingunum inn í arbeiði sítt.

Høvuðsniðurstøðurnar í donsku kvantitativu kanningini eru, at flestu børn hava ein jaligan hugburð til lesing; gongdin frá 2010 til 2017 hevur tó verið tann, at børn lesa minni í frítíðini, og at minkingin fyri ein týðandi part kemst av, at gentur lesa minni nú enn áður. Børnini siga, at tey høvdu lisið meiri, um skúladagurin var styttri, og tey høvdu meiri tíð; íblástur til lesing fáa flestu børn frá filmi, vinum og mammuni.

Bókasavnsvanarnir hjá donskum børnum eru ógvuliga ymiskir; ein fjórðingur av børnunum lænir bøkur ofta, og somuleiðis ein fjórðingur lænir aldri bøkur. Talgildu pallarnir, har bókasøvn miðla bøkur, verða stórtsæð ikki brúktir. Tey flestu, sum brúka bókasøvnini, halda, at tey, sum starvast á bókasøvnunum, duga væl at vegleiða.

Tá ið talan er um miðlavanar, vísir danska kanningin, at boð á sosialu miðlunum umframt tekstir á heimasíðum er tað slagið av teksti, børn lesa mest, at dreingir brúka meiri tíð til talgild spøl enn gentur, at youtube og ymsar stroymingartænastur er tað slagið av undirhaldi, flest børn brúka nógva tíð til og helst vilja brúka, tá ið tey skulu hugna sær, at gentur brúka meiri tíð til sosialu miðlarnar enn dreingir, meðan bókin er tann miðilin, børn raðfesta hægst, tá ið talan er um læring og vitan.

Útsagnirnar í kvalitativu kanningini geva týðiligar ábendingar um, at skulu børn haldast til bókina og framhaldandi verða eggjað til at lesa í frítíðini, mugu tey vaksnu ganga á odda og onkursvegna skapa eina mentan og nakrar vanar í heiminum, sum gera, at lesing er ein natúrligur partur. Tá ið tað er sagt, mugu vit eisini staðfesta, at tey flestu børnini lesa bøkur í skúlanum heldur enn heima, og at tað at lesa í frítíðini heima stendur niðarlaga á listanum, tá ið talan er um at velja eitthvørt til

undirhald. Um somu tíð staðfestir kanningin, at hjá nógvum tykist tað møtimikið at lesa, og at tey børn, sum lesa javnan, lesa, tí at foreldrini eggja teimum til at lesa.

Tá ið børnini eru í tí aldrinum, tá ið hugurin til at lesa minkar, eru tað eitt nú talgildu miðlarnir, sum vinna og verða meiri spennandi enn bókin. Í og við at miðlarnir gerast miðilin, børn helst vilja brúka tíð til, og at vit vita, at tað eru tey vaksnu, sum eru rundan um barnið, ið mugu halda børnum til, so er neyðugt at skapa umstøður fyri, at lesing verður fatað sum ein gagnlig mentan og dagdvølja millum aðrar.

Nógv børn halda, at tað er meiri møtimikið at stytta sær stundir við eini bók heldur enn at stytta sær stundir á talgildu miðlunum; tað krevur tol, tíð og áhaldni at lesa, eru nógv børn samd um; tí er sera umráðandi, at tey vaksnu rundan um barnið, umframt lærarar og bókavørðir, vegleiða og veita íblástur, soleiðis at lesing verður partur av gerandisdegnum hjá børnunum, og at tey vaksnu gera sær greitt, at tey hava ein stóran leiklut at ganga á odda, soleiðis at børn verða hildin til bókina.

Greið niðurstøða í donsku kvalitativu kanningini er, at átøkini at stimbra lesingina hjá børnum í frítíðini mugu venda sær til foreldur, skúlar og bókasøvn. Bókasøvn skulu verða týðiligari og sjónligari í miðlingini av, hvat tey hava at bjóða, tey skulu verða meiri uppsøkjandi á øllum pallum, skúlar og bókasøvn skulu skipa fyri vitjanum á bókasøvnum og raðfesta lesing og bókasavnsvitjan og taka støði í áhugamálum hjá børnunum og í samrøðu við børnini. Fyri at halda børn til at halda, at tað at lesa er spennandi og gott, skulu foreldur metast sum ein umráðandi málbólkur, tá ið talan er um miðling av tilfari og tiltøk fyri børn og ung. Í høvuðsheitum mugu bókasøvn vera tilvitað um, hvussu umráðandi tað er at miðla til foreldur, at miðla bøkur ígjøgnum foreldur, og at fáa foreldur at koma á bókasavn við børnum.

Lesikanningarbólkurin

Sissal M. Rasmussen, Lydia Didriksen, Turið Kjølbro og Marjun Ziskason tóku í 2017 stig til at gera kanning av lesivanunum hjá børnum í 4., 6. og 9. flokki; fyritøkan Lóður framdi kanningina, og Mentamálaráðið fíggjaði høvuðspartin av kanningini; umframt lótu Føroya Lærarafelag, Starvsvmannafelagið, Landsbókasavnið, Býarbókarsavnið í Havn og Bókasavnið við Løkin í Runavík stuðul. Eftir at kanningin var almannakunngjørd í apríl 2018 søktu stigtakararnir um stuðul av játtanini til málmenning at gera átøk við støði í kanningini; stuðulsumbønin var játtað í juni 2018. Umframt hava stigtakararnir eisini latið gera heimasíðuna malmenning.fo